## Vinn flogferðir í jólakalendara

Aftur í ár ber til at vinna flogferðir í væl umtókta jólakalendaranum á heimasíðuni hjá Atlantic Airways. Í jólakalendaranum verður settur ein spurningur hvønn dag frá 1. til 24. desember, og tríggir svarmøguleikar eru til hvønn spurningin. Tey, sum svara rætt, eru við í einum lutakasti um eina flogferð. Vinnararnir av teimum 24 flogferðunum verða kunngjørdir á www.atlantic.fo.



## Kári spyr um sambýli í Svínoy

Tingmaðurin, Kári P. Højgaard vil nú hava vissu fyri, at ætlaða eldrasambýlið í Svínoy kann gerast veruleiki. Hetta ger hann, nú skuldin hjá Klaksvíkar kommunu, sum Svínoy skjótt verður partur av, hevur rokkið tí loyvda markinum. Kári P spyr, um kommunur, sum vegna broyttar fortreytir eru komnar upp um eina álíkning og standa fyri útbyggingum og íløgum á eldraøkinum, vænta sær somu sømdir sum veittar vóru kommunum í Suðuroynni. Stórur tørvur er á ansingar- og røktarheimsplássum í Norðoyggjum. Í hesum sambandi hevur Svínoyar Kommuna framkomnar ætlanir um bygging av sambýli í bygdini. Økið er útgrivið og klárt er at fara í gongd. Spurningurin er nú, um tær fíggjarligu umstøðurnar fara at loyva tíð. Spurningurin um hetta verður settur Kaj Leo Johannesen løgmanni á tingfundinum mikudagin.

# Ikki ráð at koppseta gentur fyri krabbamein

**Ætlanin at koppseta allar 12 ára gamlar gentur fyri krabbamein er dottin niðurfyri. Tað kemur dátt við hjá Føroya Felag móti krabbameini, tí tað eru smápengar, tað snýr seg um**

KOPPSETING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Í síðsta enda er tað mannalív, sum hetta snýr sg um og tí harmast Føroya Felag móti Krabbameini um, at samgongan fyribils hevur slept ætlanini at koppseta allar 12 ára gamlar gentur fyri krabbamein í lívmóðurhálsinum, hóast tað bara kostar eina góða millión um árið*

- Hetta kemur ógvuliga dátt við, tí í síðsta enda eru tað mannalív, tað snýr seg um.

Jansy Gaardlykke á Føroya Felag móti Krabbameini er ómetaliga hørm, tá ið vit fortelja henni, at fyribils er ætlanin at koppseta allar 12 ára gamlar gentur fyri krabbameini í lívmóðurhálsinum, dottin niðurfyri.

Tað hevur ligið í kortunum, at frá 1. januar skuldi føroyska heilsuverkið bjóða 12 ára gomlum gentum ókeypis koppseting fyri krabbamein í lívmóðurhálsinum.

-Tað var okkara greiða fatan, at hetta skuldi setast í verk nú, siga bæði Jansy Gaardlykke dagligur leiðari í Føroya Felag móti Krabbameini og Jákup N. Olsen, formaður í felagnum.

Tað hevur eisini leingi verið ætlanin at seta hesa koppseting í verk í Føroyum.

Men beint nú hevur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður kortini boðað frá, at hendan koppsetingar verkætlanin verður ikki sett í verk næsta ár, tí fíggjarkarmurin gav ikki rúmd fyri at seta hesa koppseting í verk í 2009, sum hann tekur til í sambandi við, at síðsta hond skal leggjast á fíggjarlógina fyri næst ár.

Ella sagt við øðrum orðum, hava vit ikki ráð at seta hesa koppseting í verk næsta ár hóast bæði donsku heilsumyndugleikarnir og landslæknin hava mælt til, at tað verður gjørt.

Sostatt er heldur ongin peningur settur av á fíggjarlógini fyri næsta ár til endamálið

### Kostar eina millión

Annars hevur tað heilt til nú verið ein greið ætlan, at 1. januar skuldi heilsuverkið fara undir at koppseta 12 ára gamlar gentur fyri at fyribyrgja krabbameini í lívmóðurhálsinum.

Ætlanin var enntá at hava eina skiftistíð fyri gentur, sum eru 13, 14, og 15 ár, soleiðis at allar gentur, ið eru føddar eftir 1. januar 1993 kundu verið við í skipanini.

Hevði skipanin verðið sett í verk, hevði hon kostað góðar 1,1 millión krónur um árið. Men tey bæði fyrstu árini hevði hon kostað eina millión eyka um árið av tí tær 13,14 og 15 ára gomlu genturnar høvdu komið við í skipanina í skiftistíðini.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður hevur verið á landsstýrisfundi í morgun, men hann fekk kortini stundir at vátta, at skipanin verður ikki sett í verk næsta ár.

### Snýr seg um mannalív

Í Føroya Felag ímóti Krabbameini eru tey týðiliga illa við av at frætta, at ætlanin er ikki at seta hesa koppseting í verk kortini.

- Vit hava strongt á at fáa hesa koppseting til Føroya eisini og vit høvdu skilt, at talan var bara um ein avgreiðsluspurning, sigur Jansy Gaardlykke í Føroya Felag ímóti krabbameini.

Upp ímóti 20 føroyskar kvinnur fáa staðfest krabbamein í lívmóðurhálsinum um árið og skipað koppseting hevði byrgt fyri nógv teimum flestu av øllum hesum tilburðum.

Títtleikin í Føroyum er nógv hægri enn í hinum Norðurlondunum.

- Serliga tí eiga vit heilt avgjørt at fara undir hesa koppseting sum skjótast, sigur Jansy Gaardlykke.

Hon heldur, at táið bæði danska Heilsustýrið og Landslæknin í Føroyum hava mælt til at seta hesa koppseting í verk, átti at tað verið tórført at sett tey tilmælini til viks.

- Tað hevur alstóran týdning, at seta hesa koppsetingina í verk, tí hetta er í heilt stóran mun við til at fyribyrgja krabbameini í lívmóðurhálsinum.

Annars ber til at keypa koppseting, men tað kostar 4000 krónur fyri hvønn.

- Tað er nógvur pengar at leggja á borðið og tað ber sjálvandi í sær, at tað vera tey meiri vælbjargaðu, sum hava ráð at koppseta seg og ikki hini.

Jansy Gaardlykke vísir á, at hetta eru ongir pengar tað snýr seg um hjá landskassanum, tí tað kostar ikki meiri enn eina góða millión hjá heilsuverkinum at koppseta allar 12 ára gamlar gentur.

- Hetta eru smápengar afturímóti tí gagni, sum hendan koppsetingin ger, tí í síðsta enda eru hetta mannalív, tað snýr seg um.

- Tað eru fyri ein stóran part kvinnur í góðum árum og mammur, sum fáa krabbamein í lívmóðurhálsinum, so hetta er ein sjúka, sum mangan hevur heilt álvarsligar menniskjansligar avleiðingar fyri heil húski, sigur Jansy Gaardlykke.

- So gjørt upp í pengum, hevur hetta púra ongan týdning, leggur hon afturat.

Annars fer Løgtingið í morgin at viðgera eitt uppskot frá Tjóðveldinum um at bjóða øllum 12 ára gomlum gentum hesa ókeypis koppsetingina ímóti krabbameini í lívmóðurhálsinum.

## Tjóðveldi krevur koppseting

**Ungar føroyskar gentur eiga at fáa tilboð um ókeypis koppseting móti límóðurhálskrabba, sum stavar frá einum virusi. Løgtingið viðger uppskotið í morgin**

FYRIBYRGING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Tjóðveldið ger vart við, at nýggja koppsetingin kann, saman við skipaðum kanningum, so at siga útrudda ávís sløg av undirlívskrabba. Tí metir flokkurin tað vera av stórum týdningi, at serliga ungar gentur fáa hetta tilboðið.

Flokkurin vísir á, at heilsumyndugleikarnir hava góðkent nýtt koppingarevni, ið gevur góða verju móti lívmóðurhálskrabba. Til ber til at keypa hetta koppingarevni, men tað er sera kostnaðarmikið. Á leið 4.000 krónur.

-Tað kann gera, at familjur, ið ikki eru væl fyri fíggjarliga, ikki hava ráð at lata børn síni hesa krabbafyribyrging. Tjóðveldi metir ikki, at tað skal vera ein økonomiskur spurningur, hvørt ung verða koppsett. Tí mælir flokkurin til, at koppseting móti krabba í lívmóðurhálsinum verður partur av almennu skránni fyri koppseting av børnum/ungum, og sostatt verður ókeypis, ger Tjóðveldi vart við.

Lívmóðurhálskrabbi rakar javnan ungar kvinnur. Í Føroyum fáa á leið 18 kvinnur árliga staðfest lívmóðurkrabba. Á leið helvtin teirra eru kvinnur yngri enn 45 ár. Besta verjan er, um gentan verður koppsett, áðrenn hon verður seksuelt virkin.

Umhugsast eigur eisini at lata dreingir koppsetast til tess at bróta smittuketuna, heldur Tjóðveldi.

Løgtingið viðger í morgin eitt uppskot frá Tjóðveldi um at lata ungum ókeypis koppseting móti virusi, ið elvir til krabba í lívmóðurhálsinum.